**Viðvíkjandi skráseting av almennum ognum**

Argir, tann 20. desember 2002
J.Nr.: 6060-0010/2002 / 2
(at tilskila í svari)

Til Stovnsleiðararnar

**Viðvíkjandi skráseting av almennum ognum.**

Við hesum skal verða sagt frá, at skjøtil verður nú settur á verkætlanina at fáa skrásett ognirnar hjá landinum. Stovnar, sum skráseta í skipanunum hjá gjaldstovuni, skulu skráseta ognirnar í anlegsmótulinum í Búskaparskipan landsins.

Settur verður ein bólkur við umboðum frá landsverkfrøðinginum, sjúkrahúsverkinum og gjaldstovuni at leggja til rættis, hvussu skrásett verður og mannagongdirnar í hesum sambandi. Farið verður í gongd við sjálvar skrásetingarnar í mars mánaði 2003. Fyrst og fremst er endamálið við loysnini at halda roknskap við, hvat landið eigur av ognum.

Settur verður ein bólkur at arbeiða við uppgávuni. Av tí at landsverkfrøðingurin og sjúkrahúsverkið umsita størsta partin av almennu ognunum, so verða hesi øki umboðað í arbeiðsbólkinum.

Vinarlig heilsan

*Petur Alberg Lamhauge*
*fíggjarmálastjóri*